Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 27. januar 2026
Mál nr.: 25/32997
Málsviðgjørt: HP, TM

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
[...]	*Útgjald áðrenn almenna fólkapensjónsaldurin í sambandi við framskundaða pensjón og fyritíðarpensjón* **§ 11 a.** Eftirlønarsamansparari, sum hevur fingið tillutaða framskundaða pensjón ella fyritíðarpensjón sbrt. lóg um almannapensjónir o.a., kann byrja eftirlønarútgjald, tá ið hann røkkur aldursmarkið fyri at fáa tillutaða framskundaða pensjón sbrt. lóg um almannapensjónir o.a. TAKS váttar, at útgjald av eftirlønarsamansparingini kann byrja, tá Almannaverkið hevur játtað umsókn. *Stk. 2.* Ásetingarnar í § 9, stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í § 9, stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. § 11 a.